# Tutl leggur á annan bógv

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Plátufelagið Tutl, sum seinastu fýra árini hevur verið við á MIDEM tónleikastevnuni, verður ikki við í ár. Tutl hevur aðrar ætlanir
Tá stóra MIDEM tónleikastevnan verður hildin í Cannes frá 20. til 24. januar verður tað uttan plátufelagið Tutl.

Tutl hevur verið við á hesi stevnu seinastu fýra árini, men í ár hava tey gjørt av ikki at vera við.

- Tað hevði verið gott at verið við og víst flaggið, men vit hava valt at raðfesta øðrvísi í ár, sigur Kristian Blak.

Tutl fer í hesum árinum heldur at senda føroyskar tónleikarar út í heim at spæla. Í fjør vóru konsertir uttanlands, og aftur í ár verða tað konsertir.

Síðst í hesum mánaðinum verður fyrsta tónleikaferðin, tá Kristian Blak og hansara fólk í Shalder fara á konsertferð í Argentina.



*Tutl fer í jubileumsári sínum at senda føroyskar tónleikarar út um landoddarnar at spæla*




# Clickhaze bíðar eftir Eivør

**Ætlaðar konsertir hjá Clickhaze verða avlýstar, um uppihaldið hjá Eivør Pálsdóttir í Íslandi verður drúgt**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Føroyski rockbólkurin Clickhaze stendur í løtuni uttan sína stóru stjørnu, songkvinnuna Eivør Pálsdóttir, sum í farnu viku fór til Íslands at hvíla seg og fáa viðgerð fyri kropsliga og sálarliga strongd.

Clickhaze spældi tó á trimum konsertum farna vikuskiftið, men bólkurin fer neyvan at spæla aftur, fyrr enn Eivør kemur heim úr Íslandi.

- Tað er upp á tal, at vit skulu vera við á onkrum tiltøkum í næstum, men um uppihaldið hjá Eivør í Íslandi dregur út, so verður hetta av ongum, sigur Jón Tyril, gittarspælari í Clickhaze.

- Vit fara at brúka komandi tíðina til at venja í og skriva nýggjar sangir. Eivør hevur ein týðandi leiklut í Clickhaze, og hon er partur av øllum tí, sum vit hava gjørt, tí kunnu vit ikki so væl spæla uttan hana, sigur Jón Tyril.

Tað er óvíst, hvussu leingi Eivør verður verandi í Íslandi, men hon ætlar sær at taka neyðugu tíðina fyri at koma fyri seg aftur.



*Limirnir í Clickhaze brúka tíðina, meðan Eivør er í Íslandi, til at venja og gera nýtt tilfar*



# Veitir næmingum við trupulleikum hjálp

**Kommunuskúlin í Havn hevur tikið stig til at seta á stovn ein bólk við serfrøðingum, ið hjálpir børnum, sum hava trupulleikar av ymsum slag**

SKÚLIN
*Turið Kjølbro*

Sum tann fyrsti skúlin í Føroyum hevur Kommunuskúlin í Havn í samráð við Sosialu deild í Tórshavnar býráð tikið stig til at seta á stovn ein bólk við serfrøðingum, ið hjálpir børnum, sum hava trupulleikar av ymsum slag. Serfrøðingarnir eru sálarfrøðingur, sosialráðgevi, ráðgevarar av ymsum slag ella sum heild fólk, ið hava gott tak á børnum. Enn er tiltakið so nýtt, at ikki ber til at siga, hvussu tað roynist, men skúlastjórin, Hanus Joensen, hevur góðar vónir.

- Foreldur taka væl ímóti tiltakinum, tí tey síggja allarbest, at børnini hava trupulleikar. Hinvegin er misjavnt, hvussu væl allir næmingar taka ímóti tilboðnum ella viðgerðini, teimum stendur í boði. Nøkur taka væl ímóti, meðan onnur als ikki vilja vita av, at tey hava trupulleikar.

Næmingar, ið fáa hjálp í boði, hava sum heild tungar og stórar trupulleikar, ið kunnu hava ógvuliga ymiskar orsøkir. Hjálpin, sum í størstan mun er samrøða, verður veitt í skúlatíð.

- Sum heild eru hetta eldri næmingar og endamálið er at læra tey at seta mørk, at uppbyggja sjálvskensluna og sjálvsvirðingina, sigur Hanus Joensen.

Trupulleikarnir, næmingarnir hava, eru ikki komnir eftir einum degi. Heldur hinvegin er hugsandi, at teir hava drigist við teir í nógv, nógv ár.

- Fyrr hjálp verður sett inn, størri er møguleikin fyri at fáa tey á beint aftur, sigur Hanus Joensen.

Spurningurin er so, hví skúlin tekur stig til eitt slíkt tiltak. Eru ikki aðrir stovnar, ið eiga at hjálpa børnum, sum hava trupulleikar.

- Møguligt, men hesi børnini ganga í okkara skúla og fyri at undirvísingarstøðan skal vera nóg góð, er neyðugt at næmingar klára at taka ímóti undirvísing, og tað megna teir ikki, um teir eru illa fyri sosialt ella í aðrar mátar. Tí meta vit, at tað er arbeiðið hjá okkum at geva næmingum fyritreytir fyri at kunna læra.

Hetta serliga tiltakið, ið ikki kann sigast annað enn er sera positivt, hevur leingi verið í umbúna.

- Fyrireikingarnar hava verið drúgvar og tungar, ikki minst at fáa skipanina at góðtaka tiltakið, tí onkur skal jú gjalda.

Í øðrum londum er vanligt, at skúlar í samstarvi við almennar myndugleikar taka stig til tilboð, ið kunnu hjálpa skúlanæmingum við trupulleikum.



*Næmingar megna ikki at taka ímóti undirvísing, um teir eru illa fyri sosialt ella í aðrar mátar. Tí er tað okkara arbeiði at geva næmingum fyritreytir fyri at kunna læra, sigur Hanus Joensen, skúlastjóri í Kommunuskúlanum í Havn*

# Skúlagarður brúktur til misbrúk





*Leivdir frá hasjroyking í Sankta Frans skúla*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í myrka skúlagarðinum í Sankta Frans skúla í Havn hava fólk í fleiri ár havt til fragd at roykja hasj um vikuskiftið**

MISBRÚK
*Turið Kjølbro*

Hvønn mánamorgun á síni rundu ígjøgnum skúlagarðin og einstaka skúlaøkið finnur húsavørðurin í Sankta Frans skúla í Havn holaðar sodavatnsfløskur og annað, fólk hava brúkt til at roykja hasj við. Hetta fer fram inni undir skýlinum í ovara skúlagarðinum eftir skúlatíð, um kvøldarnar og serliga um vikuskiftið í øllum veðri so at siga.

- Hevur tað verið kolandi stormur, er minni at finna, men annars komi eg fram á ymiskt hvønn einasta mánamorgun, greiðir húsavørðurin frá.

Hvørji hesi fólkini eru, sum roykja hasj í skúlagarðinum í Sankta Frans skúla, veit húsavørðurin ikki. Sjálvur hevur hann ongan sæð, so vit kunnu ímynda okkum, at hetta eru ungfólk. Staðið er kanska væl valt. Har er eingi ljós í nánd og tí ógvuliga myrkt og friðarligt.

- Tað loysir seg ikki at seta píkatráð upp ella steingja garðin inni. Tey ungu finna altíð ein útveg at sleppa inn. Men settu vit ljós upp í garðinum, rokni eg við, at hesi fólkini hildu seg burtur. Tá høvdu vit øllum førum ikki kent seg so trygg.

Talan er um fløskur, sum hol er brent ígjøgnum og slanga uppá 8-10 cm stingur uppúr. Eisini kemur húsavørðurin framá brotnar tendrarar og áfyllingsdunkar til gasstendrarar, sum eftir øllum at døma verða brúkt hjá fólki til at fáa eina kenning við. Umframt liggja brotnar ølfløskur eisini í garðinum.

Leivdirnar frá hasjroykingini er húsavørðurin komin framá í nógv ár, í øllum førum í eini 6-7 ár. Løgreglan hevur tvær ferðir verið á staðnum, kannað málið og farið avstað við fløskum.

Leiðslan á Sankta Frans skúla sigur, at tað er ógvuliga torført at fáa bilbukt við misbrúkið, sum fer fram á økinum hjá skúlanum.

- Hetta fer fram, tá ið eingi børn eru í skúla, og tískil síggja næmingar á skúlanum ikki, hvat fer fram. Og tað verður altíð ruddað upp, áðrenn børnini koma í skúla um morgunin. At steingja skúlagarðin av, er ongin loysn, men at seta ljós kundi kanska hjálpt, sigur Selmar Jacobsen, stjóri í Sankta Frans skúla.